# fyrsti intellektuelli



*Ein sveimandi Tróndur í Gøtu, sum tó hevur bæði beinini á jørðini.*

Mynd Jan Müller




ti Sverri snildi – og vann. Tróndur í Gøtu hevði ivaleyst gjørt tað sama.

**Kæru áhoyrarar!**

Okkara smáu oyggjar hava upp ígjøgnum tíðirnar verið ein politisk og búskaparlig eind, sum skiftandi máttir hava viljað havt valdið á – Noreg, Danmark og tann katólska kirkjan.

Í 20. øld hevur tað eydnast okkum at koma ígjøgnum tveir heimsbardagar, har stórveldini stríddust um ræðið á Atlantshavinum. Í nýggjari tíð, og kanska serstakliga aftan á 1989, tá ið Múrurin fall, eru okkara objektivu kringumstøður kanska vorðnar uppaftur ótryggari og torførari at kenna seg aftur í og lofta sær í. Eyðkendar, sum tær eru av bardøgum burturi í heimi, búskaparligum kastivindum, sterkum og ikki sjáldan óblíðum búskaparfelagsskapum, rávøru og tilfeingi, sum brádliga kann svíkja – umframt nú í seinastuni bráðari og ógvusligari dýrtíð. Í slíkum føri er brúk fyri gávuríkum fólki. Einum renna í huga orðini hjá Fríðriki Petersen:

*Gev teimum Tróndar*
*skarpa vit, men Sigmunds*
*bjarta hjartalit.*
*Gev teimum tolgóða, sterka*
*sál, gev teimum Sverris vilja sum stál.*

Víst hava vit brúk fyri Sigmundar bjarta hjartaliti. Men sum ongantíð fyrr hava vit brúk fyri skarpa viti Tróndar. Tað er tí í tøkum tíma, at minnisvarði verður reistur føroyinginum og gøtumanninum Tróndi í Gøtu.

Við hesum Tróndardøgum skriva vit enn eitt kapitul um Trónd. Tað er mín vón, at vit við hesum kapitli fortelja um eitt fólk, sum varir og lærir av søguni og í henni sær vísdóm. Tí eitt fólk, ið ikki lærir av søguni, er dømt at elta fortíðar misslóðir.

Tað skal vera mín vón, at minnið um henda mann, skúlamannin, klóka telvaran og Føroya helst fyrsta intellektuella, fer at styrkja okkum í stríðnum at sigla nútíðar eins og framtíðar krøppu og lúnsku íður um Mjóvanes og úti á heimsins høvum, har landsins synir sigla.

Við ynski um at vit við støði í hesum minni varða av okkara dýrabara náttúrutilfeingi, at vit menna okkara útbúgving, at vit víðka okkara verðsliga banka við nýggjum hugskotsfæi, og at vit í framhaldandi samljóði skapa framburð og vælferð – skal hiðani við Tróndargrund við Gøtuvík, mín heilsan vera egnu orð Tróndar:

*Givnir eru einglar góðir*
*ganga ei eg eina má,*
*ferðum mínum fylgja fróir*
*fagrir einglar Guði frá;*
*biði bøn eg, fyri Krist*
*bera mína bøn teir vist;*
*syngi sálm eg Guð at æra,*
*sær hann til mín lut at*
*vara.*

Takk fyri lutin!

Jóannes Eidesgaard,
løgmaður

*Gøtudreingir lýða á røðu løgmans, tá standmyndin av Tróndi í Gøtu varð avdúkað leygardagin.*

Mynd Jan Müller